Kunngerðablaðið A
2011 Hefti 39
ISSN 0907-905X

Nr. 136 6. oktober 2011

**Løgtingslóg**
**um**
**keyp og sølu av fastogn o.a.**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**1. kapittul**
**Økið og allýsingar**

**§ 1.** Henda lóg er galdandi fyri:
1) Vinnuligt útboð og sølu av fastogn,
2) vinnuliga mekling í sambandi við keyp og sølu av fastogn, og
3) aðra vinnuliga ráðgeving og tænastu í sambandi við keyp og sølu av fastogn.

*Stk. 2.* § 22, stk. 1 er tó galdandi fyri alt vinnuvirksemi, og § 25, stk. 1, 3. pkt. er galdandi í øllum førum.
*Stk.* 3. Undantikið ásetingina í § 25, stk. 1, 3. pkt. er henda lóg bert galdandi, tá tað vinnuliga virksemið er vent til ein brúkara, ella tá tað vinnuliga virksemið er framt vegna ein brúkara, sbr. stk. 5. Tann vinnurekandi hevur próvbyrðuna fyri, at tað framda vinnuvirksemi ikki er fevnt av lógini.
*Stk. 4.* 3. kapittul er bert galdandi fyri virksemi, sum er fevnt av stk. 1, nr. 2. Ásetingarnar í § 8, stk. 3, 4. pkt. um áseting av reglum um deponering og veitan av trygd, § 17, stk. 1, nr. 4 um søluuppseting, § 17, stk. 1, nr. 5 um keypssáttmála, § 17, stk. 3 um áseting av reglum um innihald í og fremjan av fyrisetninginum, § 18 um fíggingartilboð og § 19 um brutto- og nettoútreiðslur eru tó eisini galdandi fyri virksemi, sum er fevnt av stk. 1, nr. 1.
*Stk.* 5. Ein brúkari eftir hesi lóg er at skilja sum ein, sum
1) selur eina fastogn, sum viðkomandi sjálvur í høvuðsheitum ikki hevur nýtt til vinnuligt virksemi, ella
2) keypir eina fastogn, sum í høvuðsheitum ikki er ætlað til vinnuligt virksemi hjá viðkomandi sjálvum.

*Stk. 6.* Ein fastogn eftir hesi lóg er at skilja sum
1) ein fastogn ella partur av eini fastogn,
2) ideellur lutur av eini fastogn,
3) ein lutur í einum lutaíbúðafelag, sum er stovnað ella sum er undir stovnan, og
4) eitt partabræv ella annað heimildarskjal við einum bústaðarnýtslurætti knýttum afturat sær.

*Stk. 7.* Ein ognarmiðlari eftir hesi lóg er at skilja sum ein millumgongumaður, sum vinnuliga starvast við keyp og sølu av fastogn frá einum ella fleiri handilsstøðum.
*Stk. 8.* Ein ognarmeklari eftir hesi lóg er at skilja sum ein ognarmiðlari, sum er skrásettur í almennu ognarmeklaraskránni hjá Skráseting Føroya, og sum tí hevur fingið rætt til at kalla seg ognarmeklari, sbrt. § 25.
*Stk. 9.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur, sum nágreina ella víkja frá reglunum í hesi lóg, um neyðug atlit verða tikin til serlig viðurskifti, sum eru galdandi fyri viðkomandi slag av fastogn.

**2. kapittul**
**Almennar ásetingar**

*Kontantprísur*

**§ 2.** Kontantprísur er at skilja sum tann prísur, sum ognin kann keypast fyri kontant uttan yvirtøku av láni.

*Virðismeting*

**§ 3.** Tá ein ogn verður virðismett við keypi ella sølu fyri eyga, skal tann vinnurekandi meta um tann prís, sum ognin ætlandi kann verða seld fyri innan fyri eitt ávíst tíðarskeið. Tann vinnurekandi skal taka atlit til marknaðarviðurskiftini, staðsetingina og skipanina av ognini og aldur og støðu á ognini.
*Stk. 2.* Tann vinnurekandi skal ráðgeva brúkaranum um tørv á og møguleika fyri eini byggitekniskari gjøgnumgongd av ognini.

*Kontantprísútboð*

**§ 4.** Ognin skal verða boðin út fyri kontantprís. Ognin kann tó verða boðin út við áheitan um at geva tilboð, men í slíkum føri skal metti kontantprísurin verða upplýstur. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um licitatiónssølu, tá fastogn verður boðin til sølu, heruppií eisini um rættin til upplýsingar um givin boð.

*Stk. 2.* Søla kann verða treytað av yvirtøku av verandi lánum, men ikki av avtalu um fíggingina í aðrar mátar.

*Prísupplýsingar í lýsingum o.a.*

**§ 5.** Í lýsingum og í aðrari marknaðarføring skal kontantprísurin á ognini verða upplýstur, sbr. § 4, stk. 1, 1. pkt., ella metti kontantprísurin, sbr. § 4, stk. 1, 2. pkt. Fíggjarligar upplýsingar, sum verða givnar í lýsingum og við aðrari marknaðarføring, skulu vera einsháttaðar.

*Ognarkeyp og privatbúskapur*

**§ 6.** Ráðgeving um, hvørt ein brúkari hevur ráð til at keypa eina fastogn, skal verða grundað á ta neyðugu gjøgnumgongdina og metingina av kendum upplýsingum um inntøkur og útreiðslur brúkarans. Ráðgevin skal áseta ta brutto- og nettoútreiðslu, sbr. § 19, sum, grundað á eina neyva fíggjarætlan, ráð eru til. Ráðgevin skal harumframt áseta tað kontantprísstøðið, sum fíggjarætlanin gevur møguleika at keypa fastognina fyri, umframt teir møguleikar, sum brúkarin hevur fyri at fáa eitt keyp fíggjað.

*Serlig ráðgevaraáhugamál*

**§ 7.** Hevur ráðgevin serlig fíggjarlig ella persónlig áhugamál í vali brúkarans av fígging, trygging ella av øðrum veitingum, sum eru knýttar at keypi og sølu av fastogn, skal ráðgevin kunna brúkaran um hesi viðurskifti.
*Stk. 2.* Fær ráðgevin provisión, avsláttur ella annað viðurgjald fyri ognarmiðlanina ella fyri útvegan av fígging, trygging, lýsingum ella øðrum veitingum í sambandi við keyp og sølu av fastogn, skal ráðgevin kunna brúkaran um, hvaðani hetta viðurgjald kemur. Ráðgevin skal harumframt kunna brúkaran um møguleikan at fáa upplýst støddina á provisión, avslátri ella øðrum viðurgjaldi og skal, eftir umbøn, upplýsa hetta. Upplýsingarnar skulu vera skrivligar og skulu latast brúkaranum samstundis, sum brúkarin verður kunnaður um tær treytir ella tey viðurskifti, sum ráðgevin hevur serligan áhuga í, sbr. stk. 1.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta serligar reglur um upplýsingarskylduna eftir stk. 1 og 2.

## 3. kapittul
## Ognarmiðlan

*Ræturin at útinna ognarmiðlanarvirksemi*

**§ 8.** Rætt til vinnuliga at miðla fastogn hava einans
1) ognarmeklarar, sum eru skrásettir, sbr. § 25, og
2) advokatar, sum hava rætt til at útinna advokatvirksemi eftir rættargangslógini.

*Stk. 2.* Vinnuligt ognarmiðlanarvirksemi kann einans verða skipað sum einstaklingavirki, íognarfelag ella serligt smápartafelag, partafelag ella kommanditt-partafelag (partnarafelag). Ognarmiðlaravirksemi skal verða rikið frá einum sjálvstøðugum handilsstaði, uttan so, at allir eigararnir eru ognarmeklarar ella advokatar, sbr. stk. 1.
*Stk. 3.* Tað er ein treyt fyri at útinna ognarmiðlanarvirksemi, at nøktandi fíggjarlig trygd er útvegað, soleiðis at eitt og hvørt peningakrav, sum ein brúkari kann fáa móti viðkomandi ognarmiðlara í sambandi við ognarmeklaravirksemið, kann verða rindað. Landsstýrismaðurin ásetur neyvari reglur um hetta, heruppií hvussu leingi, trygdin skal vera tøk. Landsstýrismaðurin ásetur harumframt reglur um deponering keyparans av parti av keypsupphæddini og garantiveitan, heruppií reglur um, nær trygdin skal verða veitt og støddina og rentanina av teirri deponeraðu upphæddini.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um fastognarmiðlanarvirksemi.
*Stk. 5.* Ognarmiðlanarvirksemi skal verða útint frá einum høvuðshandilsstaði, sum er undir leiðslu av einum ognarmeklara ella einum advokati, ið hevur hetta sum høvuðsstarv. Loyvt er at seta deildir á stovn, sum ikki hava sjálvstøðuga leiðslu, men sum eru fevndar av høvuðsleiðsluni.
*Stk. 6.* Eitt deyðsbúgv, ein hjúnafelagi, sum situr í óskiftum búgvi, eitt trotabúgv ella verji hjá einum, sum er ómynduggjørdur, kann, hóast ásetingina í stk. 1, halda fram við ognarmeklaravirkseminum við tí endamáli at niðurlaða ella selja virksemið. Hetta er tó bert galdandi í 1 ár eftir, at ognarmeklarin er deyður, eftir at trotaúrskurður er sagdur, ella eftir at avgerð um ómynduggering er tikin.

*Fyrisetningurin*

**§ 9.** Ein vinnurekandi, sum átekur sær sum fyrisetning at miðla keyp og sølu av fastogn, skal, við fyriliti fyri áhugamálunum hjá báðum pørtum, virka fyri, at handilin verður framdur, og at handilin verður framdur innan fyri ta tíð, fyri tann kostnað og eftir teimum treytum, sum eru avtalað við tann, sum hevur sett fyrisetningin.

*Avtalan um fyrisetningin*

**§ 10.** Avtala um ognarmiðlan skal vera skrivlig, og týðiliga skal vera tilskilað, nær og hvussu viðurgjaldið skal verða rindað. Avtalan skal í minsta lagi innihalda treytir um longd á fyrisetninginum, nágreinan av teimum veitingum, sum eru partur av fyrisetninginum, og upplýsingar um tað viðurgjald, sum verður rindað fyri hvørja einstaka veiting. Um úrslitatreytað viðurgjald er avtalað, kunnu veitingarnar, nevndar í 2. pkt., tó verða givnar upp sum eitt samlað viðurgjald.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um innihaldið í avtaluni, undir hesum reglur um, hvussu endaliga viðurgjaldið skal verða nágreinað. Landsstýrismaðurin kann við hesum víkja frá § 11, stk. 4, tá umræður rindan til triðjamann fyri veitan av váttan, sum er partur av avgerðargrundarlagnum undir einum handli.
*Stk. 3.* Ognarmiðlarin kann ikki krevja viðurgjald á øðrum grundarlagi enn á eini avtalu, sum er í samsvari við stk. 1 og 2.

*Úrslitatreytað viðurgjald og uppgerð av endaligum viðurgjaldi*

**§ 11.** Í avtalum um ognarmiðlan, har ásett er, at rindanin av viðurgjaldinum er treytað av, um keypssáttmáli er gjørdur (úrslitatreytað viðurgjald), kann ognarmiðlarin einans treyta sær viðurgjald, um

1) keypssáttmáli verður gjørdur, áðrenn avtalan um ognarmiðlan gongur út, ella um
2) tað, eftir at avtalan um ognarmiðlan er gingin út, verður gjørdur keypssáttmáli, sum hevur støði í tí arbeiði, sum ognarmiðlarin hevur gjørt, og uttan at annar ognarmiðlari hevur luttikið, um metast má, at gerð av keypssáttmálanum er útsett fyri at halda ognarmiðlaran uttanfyri.

*Stk. 2.* Fevnir fyrisetningurin um sølu, fellur kravið um úrslitatreytað viðurgjald burtur, um handilin ikki verður framdur vegna viðurskifti hjá einum ávísum keypara. Snýr fyrisetningurin seg um at keypa, fellur kravið um úrslitatreytað viðurgjald burtur, um handilin ikki verður framdur vegna viðurskifti hjá einum ávísum seljara.

*Stk. 3.* Fyri tiltøk, sum eru partur av fyrisetninginum, kann gjald bert verða kravt rindað sum partur av avtalaða viðurgjaldinum.

*Stk. 4.* Avtalast kann, at viðurgjaldið fevnir um nærri ásettar nettoútreiðslur, sum ognarmiðlarin rindar sum gjald fyri uppgávur, sum eftir avtaluni skulu verða gjørdar av triðjamanni.

*Stk. 5.* Í uppgerðini av endaliga viðurgjaldinum skal greitt verða tilskilað, hvørjar veitingar brúkarin hevur fingið, umframt viðurgjaldið fyri hvørja einstaka veiting sær. Um úrslitatreytað viðurgjald er avtalað, kann uppgerðin fyri tær í § 17, stk. 1 nevndu veitingar tó verða givin sum eitt samlað viðurgjald.

*Stk. 6.* Ognarmiðlarin kann ikki frá keypara krevja viðurgjald fyri at vísa fram ognina í sambandi við broyting av eini fíggingaravtalu, sbr. § 18, stk. 3.

*Longdin á fyrisetninginum*

**§ 12.** Fyrisetningurin má ikki standa við longri enn 6 mánaðir. Fyrisetningurin kann verða longdur við í mesta lagi 3 mánaðum í senn.

*Stk. 2.* Fyrisetningurin kann verða sagdur upp uttan ávaring.

*Stk. 3.* Verður fyrisetningurin sagdur upp av brúkara, hevur ognarmiðlarin bert krav upp á eitt rímiligt viðurgjald fyri tað arbeiðið, sum er gjørt, um hetta er avtalað frammanundan. Viðurgjaldið kann, tá ið talan er um sølufyrisetning, bert í serligum førum verða hægri enn fjórðingurin av tí viðurgjaldi, sum hevði verið goldið, um handlað varð fyri tann kontantprís, sum ognin var sett til sølu fyri. Hevur ognarmiðlarin sett skyldur sínar til viks, hevur hann ikki krav upp á viðurgjald.

*Upplýsingarskylda*

**§ 13.** Ognarmiðlarin skal ráðgeva tí, sum hevur sett fyrisetningin, og skal geva báðum pørtum tær upplýsingar, sum hava týdning fyri handilin og fyri fremjanina av handlinum. Ognarmiðlarin skal

1) ráðgeva báðum pørtum um tørv á og møguleika fyri eini byggitekniskari gjøgnumgongd av ognini,
2) kunna báðar partar um frágreiðingina frá byggitekinsku gjøgnumgongdini av ognini, um henda er gjørd,
3) ráðgeva báðum pørtum um tørv á og møguleika fyri at tekna eina eigaraskiftistrygging móti fjaldum feilum o.a., og
4) lata seljara og keypara kunningartilfar um byggitekniska gjøgnumgongd (støðulýsing), umframt annað týðandi kunningartilfar.

*Kanningarskylda*

**§ 14.** Ognarmiðlarin skal í neyðugan mun gera kanningar og skal fáa til vega og eftirkanna upplýsingar við tí fyri eyga at tryggja, at keypssáttmálin á fullgóðan hátt skipar viðurskiftini partanna millum soleiðis, at endaliga staðfestingin av handlinum bert er eitt avgreiðslumál.

*Partsumboðan*

**§ 15.** Eingin kann umboða báðar partar í sama handli.

*Stk. 2.* Ognarmiðlarin skal røkja tørvin og áhugamálini hjá tí, sum hevur sett fyrisetningin. Tó skal ognarmiðlarin fremja virksemi sítt við atliti til hin partin. Um hin parturin ikki er stuðlaður av egnum ráðgeva, skal ognarmiðlarin ráðgeva viðkomandi um tørv á og møguleika fyri at søkja sær stuðul.

*Stk. 3.* Um ein ognarmiðlari sjálvur ynskir at keypa eina ogn, sum viðkomandi hevur til uppgávu at selja, skal viðkomandi skrivliga

1) siga upp fyrisetningin,
2) frásiga sær viðurgjald sítt og
3) ráðgeva seljara um tørv á og møguleika fyri at søkja sær annan stuðul.

*Stk. 4.* Eftir at bindandi keypssáttmáli, sum ikki kann verða iðraður eftir lóggávuni um iðranarrætt, er gjørdur, kann ognarmiðlarin gera avtalu við hin partin um stuðul til uppgávur, sum bert eru avgreiðsluuppgávur í sambandi við, at handilin verður endaliga staðfestur.

*Brúkaraleiðbeinandi ráðgeving*

**§ 16.** Ráðgevingin hjá ognarmiðlara skal lúka tey krøv, ið verða sett sakkønari ognarmiðlan, sum einans er treytað av áhugamálum og viðurskiftum partanna.

*Stk. 2.* Ein ognarmiðlari skal upplýsa báðum pørtum um eitt og hvørt fíggarligt ella persónligt áhugamál, sum ognarmiðlarin hevur í, at handilin verður framdur, ella í vali partanna av fígging, trygging ella í øðrum veitingum, sum eru knýttar at keypi og sølu av fastogn. Ognarmiðlarin skal geva tí, sum hevur sett fyrisetningin upplýsingar um hetta í avtaluni um fyrisetningin. Ognarmiðlarin skal geva hinum partinum skrivliga upplýsing um hetta samstundis, sum hesin parturin verður kunnaður um tær treytir ella tey viðurskifti, sum ognarmiðlarin hevur serligan áhuga í. Ein ognarmiðlari, sum hevur ein fyri-

setning frá seljara, skal geva upplýsingar um hetta í søluuppsetingini.

*Stk. 3.* Upplýsingarskyldan eftir § 7, stk. 2 um provisión, avsláttur ella annað viðurgjald er galdandi í mun til báðar partar og skal verða lokin, sum ásett í stk. 2.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvussu upplýsingarskyldan eftir stk. 2 og 3 skal verða lokin.

*Sølufyrisetningurin*

**§ 17.** Ognarmiðlarin skal

1) virðismeta ognina og skal avtala við tann, sum sett hevur fyrisetningin, tann kontantprís, sum ognin skal verða boðin til sølu fyri, sbr. § 3 og § 4,
2) fáa til vega eina fíggingarváttan frá keypara,
3) meta um søluvinningin, sbr. § 20,
4) gera eina søluuppseting við teimum upplýsingum um ognina, sum eru neyðugar fyri at taka avgerð um keyp, og
5) gera uppskot til keypssáttmála.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um innihaldið í fyrisetninginum, og hvussu fyrisetningurin verður framdur, undir hesum eisini reglur um nýtslu ognarmiðlarans av standardskjølum, m.a. keypssáttmálum, og um tilskilast skal í skjalinum, at vikið verður frá standardtekstinum, ella um onnur skjøl enn standardskjøl verða nýtt.

*Láns- og fíggingarupplýsingar*

**§ 18.** Ognin kann verða boðin til sølu við upplýsingum um verandi lán, sum kunnu verða yvirtikin.

*Stk. 2.* Um ein ognarmiðlari ger fíggingaruppskot, skal hetta síggjast í einum skjali, sum er leyst av søluuppsetingini. Landsstýrismaðurin ásetur neyvari reglur um hetta.

*Stk. 3.* Hóast ein keypssáttmáli inniheldur treytir um yvirtøku av verandi láni ella aðra fígging, hevur keypari, í mun til seljara og ognarmiðlara, rætt til at fíggja keypið á annan hátt, um hetta kann verða gjørt uttan tap ella munandi bága fyri seljara. Hetta er galdandi, sama um ognarmiðlarin hevur ein sjálvstøðugan áhuga í, at fíggingin verður løgd til rættis sum avtalað.

*Nýtsluútreiðslur*

**§ 19.** Ognin skal verða boðin til sølu við upplýsingum um tær faktisku nýtslutreytaðu útreiðslurnar, sum hava verið seinasta árið. Kunnu hesar upplýsingar ikki verða útvegaðar, ella eru hesar ikki umboðandi, skal upplýsast ein mett nýtsla.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um avmarking av útreiðslunum í stk. 1 og um brutto- og nettoútreiðslur eftir § 6, undir hesum reglur um, hvussu útreiðslurnar verða roknaðar og upplýstar.

*Søluvinningur*

**§ 20.** Við søluvinning er at skilja tann upphædd, sum seljari fær at ráða yvir, tá ognin er seld og handilin endaliga staðfestur. Tá ein ogn verður boðin út, skal gerast ein serlig útrokning av søluvinninginum, alt eftir um ognin verður seld fyri kontantprís ella við yvirtøku av verandi láni. Við sølu skal útrokningin gerast við støði í treytunum í keypssáttmálanum.

*Fulltrú ognarmiðlarans*

**§ 21.** Ognarmiðlarin kann ikki ábyrgja tann, sum sett hevur fyrisetningin, mótvegis triðjamanni uttan serliga fulltrú.

*Frítt val av ognarmiðlara*

**§ 22.** Ein avtala um annað enn ognarmiðlan millum ein vinnurekandi og ein brúkara skal ikki innihalda treytir um, at ein fyrisetningur um ognarmiðlan skal gevast einum ávísum ognarmiðlara. Er slík treyt avtalað, er avtalan í síni heild ikki bindandi fyri brúkaran, meðan avtalan, nevnda treyt tó undantikin, er bindandi fyri tann vinnurekandi.

*Stk. 2.* Stk. 1 er tó ikki galdandi fyri eina skuldarskipan viðvíkjandi skuld í ognini, sum er tryggjað við panti, um

1) debitor, sum liður í skuldarumskipanini, fær ein munagóðan lætta í gjaldstreytunum,
2) um ognin skal seljast sum liður í skuldarumskipanini, og um
3) kreditor hevur ein munandi áhuga í søluúrslitinum.

*Forboð móti at knýta saman veitingar*

**§ 23.** Ognarmiðlan má ikki vera treytað av, at partarnir keypa veitingar, sum ikki eru neyðugar fyri at tryggja, at ognarmiðlanin fer fram á rættan hátt.

*Stk. 2.* Ognarmiðlarin má ikki vegna seljaran biðja um byggitekniska gjøgnumgongd ella orkumerking ella avrokna fyri hetta. Landsstýrismaðurin kann áseta neyvari reglur um møguleika ognarmiðlarans at veita seljaranum stuðul í sambandi við umbøn um byggitekniska gjøgnumgongd ella orkumerking og um framløgu ognarmeklarans av byggiteknisku frágreiðingini fyri keypara.

*Stk. 3.* Verður forboðið í stk. 1 og 2 sett til viks, hevur ognarmiðlarin ikki krav upp á viðurgjald.

*Endurgjaldsábyrgd*

**§ 24.** Verður brúkarin fyri tapi sum úrslit av, at ognarmiðlarin setur til viks sínar skyldur eftir lógini ella eftir fyrisetninginum, hevur brúkarin rætt til at fáa endurgjald eftir vanligu reglunum. Hevur brúkarin gjørt eftir ráðum frá einum ognarmiðlara, sum hevur serligan áhuga í hesum, sbr. § 16, stk. 2 og 3, skal ognarmiðlarin veita prógv fyri, at hann hevur lokið skyldur sínar eftir lógini og eftir avtaluni.

*Stk. 2.* Er gjørd ein skeiv útrokning av søluvinninginum, sbr. § 20, 3. pkt., og er henda útrokning til bága fyri brúkaran, og er brúkarin í góðari trúgv, hevur brúkarin krav um endurgjald av muninum millum ta skeivu og ta røttu útrokningina. Er gjørd ein skeiv útrokning í uppskotinum til fígging, sbr. § 18, stk. 2, og er henda útrokning til bága fyri brúkaran, og

er brúkarin í góðari trúgv, hevur brúkarin krav um rímiligt endurgjald fyri munin millum ta skeivu og ta røttu útrokningina. Hevur brúkari í góðari trúgv handlað við áliti til rættleikan av eini virðismeting, og víkir henda virðismeting munandi frá einari rættari virðismeting, hevur brúkarin krav um rímiligt endurgjald fyri munin millum virðismetingarnar.

*Ognarmeklarar*

**§ 25.** Skráseting Føroya førir eina almenna skrá yvir ognarmeklarar. Persónar, sum eru tiknir upp í hesa skrá, hava rætt til at nýta heitið ognarmeklari. Eingin annar hevur rætt til at nýta hetta heitið ella heiti, sum eru soleiðis háttað, at tey kunnu mistakast fyri heitið ognarmeklari.

*Stk. 2.* Rætt til at verða tikin upp í skránna hevur ein og hvør, sum

1) hevur bústað her í landinum,
2) er myndugur og ikki undir verjumáli eftir § 5 í verjumálslógini ella undir samverjumáli eftir § 7 í verjumálslógini,
3) ikki er farin í gjaldsteðg,
4) ikki er undir trotabúarviðgerð,
5) ikki útinnir vinnuvirksemi ella hevur eitt starv, sum eftir reglum, ásettar av landsstýrismanninum, ikki er sambæriligt við virksemi sum fastognarmiðlari,
6) lýkur neyvaru treytirnar til ástøðiligt innlit í ognarmiðlan, sum landsstýrismaðurin ásetur,
7) lýkur neyvaru treytirnar til praktiska vitan um ognarmiðlan, sum landsstýrismaðurin ásetur,
8) er fevndur av trygd eftir § 8, stk. 3,
9) ikki hevur víst slíkan atburð, at metast má, at viðkomandi ikki fer at útinna virksemi sum ognarmeklari á fullgóðan hátt, og
10) ikki hevur falna skuld til tað almenna upp á 50.000 kr. ella meira.

*Stk. 3.* Ein skráseting verður strikað

1) tá viðkomandi doyr,
2) um treytirnar í stk. 2, nr. 1, 2, 4, 5 ella 8 ikki longur eru loknar,
3) um viðkomandi hevur gjørt seg sekan í grovum ella endurtiknum vansketni í útinnan síni av virkseminum sum ognarmiðlari, og Skráseting Føroya metir, at viðurskiftini geva orsøk til at halda, at viðkomandi heldur ikki frameftir fer at útinna virksemi á fullgóðan hátt, ella
4) um viðkomandi hevur falna skuld til tað almenna upp á 100.000 kr. ella meira.

*Stk. 4.* Striking úr skránni eftir stk. 3, nr. 3, kann vera millum 1 ár og 5 ár ella fyribils.

*Stk. 5.* Ein avgerð um striking úr skránni eftir stk. 3, nr. 3 ella 4 kann av tí, sum avgerðin viðvíkur, verða løgd fyri rættin. Umbøn um hetta skal vera móttikin hjá Skráseting Føroya í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi. Skráseting Føroya leggur síðani málið fyri rættin. Málið verður reist sum eitt borgarligt mál móti viðkomandi. Umbøn um sakarmál eftir stk. 3, nr. 3 hevur steðgandi virknað. Umbøn um sakarmál eftir stk. 3, nr. 4 hevur ikki steðgandi virknað, men rætturin kann gera av, at viðkomandi, meðan málið verður viðgjørt, skal hava rætt til at virka sum ognarmeklari. Verður ein dómur viðvíkjandi stk. 3, nr. 4 kærdur, og verður úrslitið, at strikingin úr ognarmeklaraskránni ikki er lóglig, kann tann rætturin, sum hevur sagt dómin, ella rætturin í øðrum instansi, avgera, at ognarmeklaravirksemi má ikki verða útint, meðan kæran verður viðgjørd í øðrum instansi.

*Stk. 6.* Er orsøkin til, at ein ognarmeklaraskráseting er strikað, ikki longur til staðar, skal viðkomandi eftir umbøn verða tikin upp aftur í skránna.

*Stk. 7.* Tey, sum verða tikin upp í skránna, rinda fyri upptøku og striking úr skránni, undir hesum gjald fyri at fáa útskrivað ognarmeklaraprógv. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um gjaldið eftir 1. pkt.

*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at umsóknir um skráseting sum ognarmeklari ella umbønir frá advokatum um skráseting sum ognarmeklari kunnu ella skulu gerast elektroniskt, og at skráseting, undir hesum skjalprógv fyri, at treytirnar í stk. 1-6 eru loknar, broytingar í skrásettum viðurskiftum, striking og endurupptøka verða gjørdar elektroniskt.

*Ognarmiðlanarvirksemi hjá ognarmeklarum*

**§ 26.** Ein ognarmeklari hevur rætt til at kalla seg óheftur ognarmeklari, um viðkomandi

1) ikki hevur bundið seg til at virka fyri søluni av fíggjarligum veitingum ella tænastum ella øðrum veitingum, sum hava samband við keyp og sølu av fastogn,
2) í sambandi við miðlan av veitingum og tænastum, nevnd í nr. 1, førir eina og hvørja provisión ella annan vinning, sum hann fær frá útbjóðaranum, víðari til brúkaran, og
3) sum heild útinnir virksemi sum ognarmiðlari á ein slíkan hátt, at ivi ikki kann verða reistur um óheftni hjá viðkomandi.

*Stk. 2.* Eingin annar hevur rætt til at nýta heiti “óheftur ognarmeklari” ella heiti, sum eru soleiðis háttað, at tey kunnu mistakast fyri hetta heitið.

*Stk. 3.* Ein ognarmeklari, sum hevur bundið seg til at virka fyri sølu av fíggjarligum veitingum og tænastum ella øðrum veitingum, sum hava samband við keyp og sølu av fastogn, skal útinna virksemi sítt undir einum navni, sum at sær hevur knýtt orðini “umboð fyri” ella undir einum navni, har navn samstarvspartsins ella –partanna er skoytt upp í.

*Ognarmiðlanarvirksemi hjá advokatum*

**§ 27.** Ásetingin í § 26, stk. 3, er eisini galdandi fyri advokatar.

*Upplýsingarskyldan hjá ognarmiðlanarvirkjum*

**§ 28.** Er ein peningastovnur, eitt realkredittinstitutt ella eitt tryggingarfelag eigari ella partseigari við munandi eigaraáhugamálum av einari ella fleiri ognarmiðlanarfyritøkum, ella er veitari av navni

og forskriftum fyri virkismannagongdum til eina ella fleiri ognarmiðlanarfyritøkur, skal sambandið við peningastovnin, realkredittinstituttið ella tryggingarfelagið greitt ganga fram av navninum hjá ognarmiðlanarfyritøkuni ella skal leggjast afturat navninum á ein hátt, sum skal góðkennast av Skráseting Føroya. Í mun til samstarvsavtalur, har eigaraáhugamál ikki eru, og har ognarmiðlanarfyritøkan hevur bundið seg til at virka fyri søluni av fíggjarligum veitingum og tænastum ella øðrum veitingum, skulu hesi viðurskifti verða upplýst í tí tilfari, sum verður latið brúkaranum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at stk. 1 er galdandi fyri aðrar fyritøkur, sum eru eigarar av, hava munandi eigaraáhugamál í, ella sum veita navn og forskriftir fyri virkismannagondum til eina ella fleiri ognarmiðlanarfyritøkur.

**4. kapittul**
**Frávik lógarinnar**

**§ 29.** Víkjast kann ikki frá lógini og frá teimum við heimild í lógini ásettu reglum til bága fyri brúkaran.

**5. kapittul**
**Ymsar ásetingar**

*Myndugleikar og kæra*
**§ 30.** Landsstýrismaðurin leggur umsitingina av lógini til Skráseting Føroya.

**§ 31.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um kærur um avgerðir, tiknar av Skráseting Føroya, undir hesum eisini, at avgerðir kunnu ikki verða kærdar til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

*Freistir*
**§ 32.** Tær freistir, sum eru ásettar í hesi lóg, ella í reglum, givnar við heimild í hesi lóg, byrja at ganga dagin eftir, at gerðin, sum útloysir freistina, fer fram. Hetta er galdandi fyri bæði dags-, viku, mánaðar- og ársfreistir.
*Stk. 2.* Er freistin ásett í vikum, er freistin, sbr. stk. 1, farin vikudagin eftir tann dag, freistin byrjaði at ganga.
*Stk. 3.* Er freistin ásett í mánaðum, er freistin, sbr. stk. 1, farin mánaðardagin eftir tann dag, freistin byrjaði at ganga. Er gerðin, sum útloysir freistina, framd seinasta dagin í einum mánaði, ella gongur freistin út ein mánaðardag, sum ikki er til, er freistin altíð farin seinasta dagin í mánaðinum, líka mikið hvussu langur mánaðurin er.
*Stk. 4.* Er freistin ásett í árum, er freistin, sbr. stk. 1, farin ársdagin eftir tann dag, freistin byrjaði at ganga.
*Stk. 5.* Um freistin gongur út í einum vikuskifti, á einum halgidegi, grundlógardag, jólaaftansdag ella nýggjársaftansdag, verður freistin longd til fyrsta gerandisdag eftir hetta.

**6. kapittul**
**Revsiásetingar**

**§ 33.** Er ikki harðari revsing uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður við bót revsaður tann, sum brýtur ásetingarnar í § 3, stk. 2, §§ 4 og 5, § 7, stk. 1 og 2, § 8, § 10, stk. 1 og 3, § 11, stk. 5, § 12, stk. 1 og 2, § 13, 2. pkt., § 15, § 16, stk. 2 og 3, § 18, stk. 1, § 18, stk. 2, 1. pkt., § 19, § 22, stk. 1, 1. pkt., § 23, § 25, stk. 1, 3. pkt., § 26, stk. 2 og 3, § 27 og § 28.
*Stk. 2.* Í reglum, givnar við heimild í § 1, stk. 9, § 4, stk. 1, § 7, stk. 3, § 8, stk. 3 og 4, § 10, stk. 2, § 16, stk. 4, § 17, stk. 3, § 18, stk. 2, 2. pkt., § 19, stk. 2, § 25, stk. 2, nr. 5 og § 28, stk. 2, kann verða ásett, at brot á reglurnar verða revsað við bót.
*Stk. 3.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

**7. kapittul**
**Gildiskomu- og skiftisreglur**

**§ 34.** Henda lóg kemur í gildi 1. juli 2012.

**§ 35.** Tey, sum reka ognarmiðlanar- og meklaravirksemi, tá lógin kemur í gildi, hava framvegis rætt til at reka hetta virksemi, hóast tey ikki lúka treytirnar í § 8, stk. 1-3, og § 25, stk. 2, nr. 6-7. Hesi hava tó ikki rætt til at nýta heitið "ognarmeklari" ella annað heiti, sum kann mistakast fyri heitið "ognarmeklari", sbr. § 25, stk. 1, 2. og 3. pkt.
*Stk. 2.* Tey, sum eru fevnd av ásetingini í stk. 1, skulu tó innan 1. januar 2016 lúka øll krøv lógarinnar.

Tórshavn, 6. oktober 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 18/2011

Nr. 137 6. oktober 2011

# Løgtingslóg
# um
# brúkaravernd í sambandi við at keypa og selja fastogn o.a.

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## Kapittul 1
## Støðufrágreiðing og ognarskiftistrygging

**§ 1.** Ásetingarnar í hesum kapitli galda fyri avtalur um at keypa fastogn, tá ognin í høvuðsheitum verður nýtt til bústað hjá seljara ella í høvuðsheitum er ætlað til bústað hjá keypara, sbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Ásetingarnar galda tó ikki fyri avtalur um at keypa óbygd grundstykki ella grundstykki við bygningi í gerð.

**§ 2.** Hevur keypari frá seljara fingið eina støðufrágreiðing og upplýsingar um ognarskiftistrygging, sbr. §§ 4 og 5, kann keypari ikki mótvegis seljara gera galdandi, at bygningurin hevur ábrek, sbr. tó stk. 2-6. Keypari kann heldur ikki mótvegis seljara gera galdandi, at eitt ábrek átti at verið nevnt í støðufrágreiðingini.
*Stk. 2.* Stk. 1 er bert galdandi, um keypari hevur fingið ta í stk. 1 nevndu støðufrágreiðingina og upplýsingar um ognarskiftistrygging, áðrenn ein avtala er gjørd millum partarnar, tó í seinasta lagi áðrenn keypari hevur givið eitt boð, sum seljari tekur av.
*Stk. 3.* Um seljari leggur fram eitt tilboð um ognarskiftistrygging, sbrt. § 5, er stk. 1 bert galdandi, um seljari, áðrenn ta í stk. 2 nevndu freist, við einum skrivligum og bindandi lyfti hevur játtað at rinda keypara eina upphædd, sum svarar til í minsta lagi helvtina av tí uppskotna tryggingarkostnaðinum fyri ta umrøddu tryggingina, um so er, at keypari teknar hesa ella aðra trygging, ið lýkur tær treytir, sum eru nevndar í stk. 5.
*Stk. 4.* Seljari skal áðrenn ta í stk. 2 nevndu freist hava tryggjað sær, at keypari er kunnugur við tann í stk. 1 nevnda rættarvirknað. Er keypari ikki kunnugur við hetta, er stk. 1 bert galdandi, um serligar orsøkir eru fyri at halda, at keypari á annan hátt var kunnugur við henda rættarvirknað.
*Stk. 5.* Hóast ásetingina í stk. 1 kann keypari mótvegis seljara gera galdandi viðurskifti, sum eru íkomin eftir, at støðufrágreiðingin er gjørd ella endurnýggjað, sbrt. § 4, stk. 1, umframt at keypari mótvegis seljara kann gera galdandi, at ávís viðurskifti eru í stríð við ein servitutt ella við almennar forskriftir. Keypari kann harumframt mótvegis seljara gera galdandi eitt ábrek, um seljari hevur veitt eina trygd fyri umrøddu viðurskiftini ella hevur handlað svikafult ella við grovum ósketni. Keypari kann í aðrar mátar gera endurgjaldskrav galdandi mótvegis seljara eftir vanligum reglum, um seljari hevur latið bygningin gera við sølu fyri eyga.
*Stk. 6.* Hóast bygningurin hevur fysisk ábrek, forðar ásetingin í stk. 1 ikki fyri, at keypari kann traðka inn í krøv, sum seljari vegna somu viðurskifti hevði havt móti undanfarnum seljarum og móti tí, sum hevur gjørt bygningin.

**§ 3.** Keypari kann mótvegis einum byggikønum, sum hevur gjørt ta í § 4, stk. 1, 1. pkt. nevndu støðufrágreiðing, seta fram krav um skaðaendurgjald fyri ábrek, sum áttu at verið nevnd í frágreiðingini. Hevur seljari verið noyddur at rinda keypara eina upphædd fyri ábrek, sum áttu at verið nevnd í eini slíkari frágreiðing, hevur seljari rætt til rímiligt endurgjald.
*Stk. 2.* Hevur tann, sum vil gera galdandi, at eitt ábrek átti at verið nevnt í støðufrágreiðingini, ikki fráboðað tí byggikøna hetta innan 5 ár eftir tann yvirtøkudag, sum er avtalaður millum keypara og seljara, tó í seinasta lagi 6 ár eftir dagfestingina av frágreiðingini, missir viðkomandi rættin til at gera galdandi, at ábrekið átti at verið nevnt í frágreiðingini. Hetta er tó ikki galdandi, um tann byggikøni hevur veitt trygd fyri eitt longri tíðarskeið ella hevur handlað svikafult ella við grovum ósketni.

**§ 4.** Ein støðufrágreiðing skal, fyri at hava tann í § 2 nevnda rættarvirknað,
1) verða gjørd av einum byggikønum, sum er góðkendur við tilnevning, sbr. stk. 2,
2) vera skrivað á eitt serligt oyðublað, sum er góðkent av landsstýrismanninum, og
3) støðufrágreiðingin skal vera gjørd ella endurnýggjað av tí byggikøna innan 6 mánaðir fyri tann dag, keypari fær frágreiðingina.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin tilnevnir ávíst tal av byggikønum. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð reglur um tilnevning, undir hesum reglur um ábyrgdartrygging og aðrar treytir fyri tilnevning, um gjald fyri tilnevning o.a., um afturtøku og burturfall av tilnevning, og um umsiting av tilnevningarskipanini.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir reglur um virksemið sum byggikønur, undir hesum reglur um tær kanningar, sum tann byggikøni skal gera í sambandi við gerð av støðufrágreiðing, umframt reglur um viðurgjaldið hjá tí byggikøna.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um átalur, ávaringar ella afturtøku av tilnevningini sum byggikønur, undir hesum reglur um almannakunngering av persónum og fyritøkum, sum hava fingið ávaring, ella hvørs tilnevning er tikin aftur sum úrslit av álvarsligum ella endurtiknum feilum í støðufrágreiðingunum.
*Stk. 5.* §§ 144, 150, 152 og 155-157 í revsilógini verða at nýta samsvarandi fyri byggikøn, sum hava

tilnevning eftir reglum, ásettar við heimild í stk. 2, 3 og 4.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann leggja heimildir sínar eftir hesi lóg til annan myndugleika.
*Stk. 7.* Ger landsstýrismaðurin av at leggja heimildir sínar sambært hesi lóg til ein annan myndugleika, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um kærur um avgerðir, tiknar av hesum myndugleika, undir hesum eisini, at avgerðir ikki kunnu kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Landsstýrismaðurin kann eisini leggja sín kærumyndugleika til eina kærunevnd ella óheftan stovn, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina.

**§ 5.** Ein upplýsing um ognarskiftistrygging skal, fyri at hava tann í § 2 nevnda rættarvirknað, vera skrivlig og skal innihalda eina fráboðan frá einum tryggingarfelagi um:
1) tær treytir, sum eru galdandi fyri, at keypari kann tekna eina trygging viðvíkjandi ognini, sum í minst 5 ár eftir yvirtøkudagin, og við møguleika fyri leingjan til í minsta lagi 10 ár, tekur við ábrekum við fysisku støðuni á ognini, sum vóru til staðar, tá keypari yvirtók ognina, og sum ikki eru nevnd ella sum greitt eru lýst skeivt í støðufrágreiðingini, sbr. § 4, ella
2) hvørji serlig viðurskifti við fysisku støðuni á ognini hava við sær, at trygging sbrt. stk. 1 ikki kann verða teknað.

*Stk. 2.* Tann í stk. 1, nr. 1 nevnda fráboðan skal verða skrivað sum eitt bindandi tilboð til keypara og skal veita keypara eina rímiliga freist at taka av tilboðnum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin við vinnumálum kann áseta reglur um vavið av teimum í stk. 1 nevndu tryggingum og um innihaldið í teimum í stk. 1 nevndu fráboðanum frá tryggingarfeløgum.

## Kapittul 2
## Iðranarrættur í sambandi við keyp av fastogn o.a.

**§ 6.** Ásetingarnar í hesum kapitli galda, við teimum í stk. 2 nevndu undantøkum, fyri avtalur um at keypa fastogn, tá ognin í høvuðsheitum er ætlað til bústað fyri keypara, umframt undir somu treytum fyri avtalur um at keypa lut í einum lutaíbúðarfelag og at keypa partabræv ella annað heimildarskjal við einum bústaðarnýtslurætti knýttum afturat sær.
*Stk. 2.* Ásetingarnar galda ikki fyri avtalu um at keypa fastogn o.a. á uppboðssølu, ella um umbøn um tvingsilssølu er latin inn, tá avtalan verður gjørd, og keypari visti ella átti at vitað hetta.
*Stk. 3.* Er sølan farin fram sum liður í vinnu seljarans, ella hevur ein vinnurekandi sum liður í starvi sínum gjørt ella miðlað avtaluna fyri seljara, hevur seljari próvbyrðuna fyri, at avtalan ikki er fevnd av ásetingunum í hesum kapitli.

**§ 7.** Tá keypsavtala er gjørd, kann keypari iðra hesa avtalu sbrt. treytunum í §§ 8-11.
*Stk. 2.* Um seljari ikki hevur tikið av einum tilboði um keyp, kann keypari taka aftur sítt tilboð við at geva seljara fráboðan um hetta.

**§ 8.** Iðranarrætturin er treytaður av, at keypari í seinasta lagi 6 yrkadagar eftir, at avtalan er gjørd, gevur seljara skrivliga fráboðan um, at keypari iðrar avtaluna, sbr. tó stk. 2. Fráboðanin skal vera komin fram til seljara, áðrenn freistin gongur út.
*Stk. 2.* Er avtalan gjørd við, at keypari hevur tikið av einum tilboði frá seljara um sølu, skal tann í stk. 1 nevnda fráboðan verða komin fram í seinasta lagi 6 yrkadagar eftir, at keypari fekk kunnleika til tilboðið.

**§ 9.** Er ein avtala um keyp tinglýst, er iðranarrætturin treytaður av, at keypari fremur neyðug tiltøk fyri at avlýsa avtaluna, áðrenn tann í § 8 nevnda freistin er farin.

**§ 10.** Hevur keypari tikið ognina í nýtslu, er iðranarrætturin treytaður av, at ræðið á ognini verður latið seljara, áðrenn tann í § 8 nevnda freistin er farin.
*Stk. 2.* Hevur keypari framt inntriv í ella broytingar á ognini eftir, at avtalan er gjørd, er iðranarrætturin treytaður av, at keypari í stóran mun setir ognina í sama stand, sum ognin var í, áðrenn inntrivið ella broyting varð gjørd, innan tann í § 8 nevnda freistin er farin.
*Stk. 3.* Er ognin eftir, at avtalan er gjørd, skalað ella minkað í virði á annan hátt sum úrslit av, at keypari ella onnur, sum hava havt atgongd til ognina eftir keyparans áhugamálum, hava víst ósketni, er iðranarrætturin treytaður av, at keypari fær viðurskiftini í rættlag, áðrenn tann í § 8 nevnda freistin er farin. Keypari hevur próvbyrðuna fyri, at talan ikki er um ósketni.

**§ 11.** Iðranarrætturin er treytaður av, at keypari áðrenn ta í § 8 nevndu freist, rindar seljara eitt viðurgjald, sum er 1 prosent av keypskostnaðinum, sbr. tó stk. 2. Keypari kann við frígerandi virknaði rinda einum vinnurekandi, sum nevnt í § 6, stk. 3.
*Stk. 2.* Keypari skal ikki rinda viðurgjald eftir stk. 1, um avtalan er gjørd við ein seljara, sum hevur latið ognina gera við sølu fyri eyga, ella hvørs høvuðsstarvs er at selja fastogn, um seljari hevur handlað sum liður í hesum starvi. Er talan um avtalu um keyp av grundstykki og um ný- ella liðugtgerð av einum heilum bygningi á grundstykkinum, sum nevnt í § 14, verður § 17 at nýta samsvarandi.

**§ 12.** Hevur keypari rindað ein part av keypskostnaðinum, skal seljari, um keypari iðrar avtaluna, beinanvegin rinda keypara ta rindaðu upphæddina, tó við frádrátti av møguligum viðurgjaldi eftir § 11. Frá-

dráttur kann fara fram, hóast keypari hevur rindað upphæddina til ein vinnurekandi, sbrt. § 6, stk. 3.
*Stk. 2.* Hevur seljari frá keypara, sum trygd fyri rindan av keypskostnaðinum, móttikið eitt pantibræv við panti í ognini ella eitt samsvarandi skjal, skal seljari, um avtalan verður iðrað, beinanvegin lata keypara skjalið aftur. Kann seljari ikki beinanvegin lata keyparanum skjalið aftur, skal seljari halda keypara skaðaleysan fyri eitt og hvørt krav sambært skjalinum, og keypari kann krevja, at seljari veitir nøktandi trygd fyri hesum.

**§ 13.** Leygardagar og flaggdagur verða ikki roknaðir sum yrkadagar, tá iðranarfreistin verður roknað, sbr. § 8.

## Kapittul 3
## Iðranarrættur í sambandi við avtalur um keyp ella gerð av heilum bygningum

**§ 14.** Ásetingarnar í hesum kapitli galda fyri avtalur um at keypa ella gera heilan bygning, sum ein vinnurekandi, arbeiðstakarin, ger sum liður í starvi sínum, um so er,
1) at bygningurin í høvuðsheitum skal latast ella í høvuðsheitum bæði prosjekterast og gerast av arbeiðstakaranum,
2) at bygningurin eftir sínum slagi er ætlaður til bústað fyri eina ella tvær familjur,
3) at bygningurin í høvuðsheitum er ætlaður til bústað fyri eina ella tvær familjur fyri hin partin, tann, ið bíleggur arbeiðið, og
4) at avtalan um at gera bygningin ikki er gjørd, tá tann, sum hevur bílagt arbeiðið, tekur av einum skrivligum tilboði, sum er komið fram eftir eina áheitan á fleiri um at bjóða á sama grundarlagi innan fyri eina nærri ásetta freist.

*Stk. 2.* Arbeiðstakarin hevur próvbyrðuna fyri, at ein avtala um at keypa ella gera ein bygning ikki er fevnd av ásetingunum í hesum kapitli.

**§ 15.** Tá avtala um at keypa ella gera ein bygning er gjørd, kann tann, sum hevur bílagt arbeiðið, taka avtaluna aftur eftir teimum í § 16 nevndu treytum.

**§ 16.** Iðranarrætturin er treytaður av, at tann, sum hevur bílagt arbeiðið, í seinasta lagi 6 yrkadagar eftir, at avtalan er gjørd, gevur arbeiðstakaranum skrivliga fráboðan um, at hann vil iðra avtaluna, sbr. tó stk. 2. Fráboðanin skal vera komin fram til arbeiðstakara, áðrenn freistin gongur út.
*Stk. 2.* Er avtalan gjørd á tann hátt, at tann, sum hevur bílagt arbeiðið, hevur tikið av tilboðnum frá arbeiðstakaranum, skal tann í stk. 1 nevnda fráboðan vera komin fram í seinasta lagi 6 yrkadagar eftir, at tann, sum hevur bílagt arbeiðið, fekk kunnleika til tilboðið frá arbeiðstakara.

**§ 17.** Um tann, sum hevur bílagt arbeiðið, iðrar avtaluna, kann arbeiðstakarin einans krevja viðurgjald fyri arbeiðið, sum sambært avtaluni longu skuldi verið gjørt, og sum er gjørt.
*Stk. 2.* Um tann, sum hevur bílagt arbeiðið, longu hevur rindað ein part av avtalaða viðurgjaldinum, ella hevur arbeiðstakarin longu sum trygd fyri rindan av viðurgjaldinum fingið eitt pantibræv ella samsvarandi skjal, verður § 12 at nýta, tó við teimum broytingum, sum fylgja av stk. 1.

**§ 18.** Tá iðranarfreistin verður roknað eftir § 16, verður § 13 at nýta samsvarandi.

**§ 19.** Ein vinnurekandi seljari ella miðlari, sbr. § 6, stk. 3, skal, áðrenn iðranarfreistin eftir § 8 byrjar, geva keypara upplýsingar um iðranarrættin sbrt. kapittul 2 í einum serligum skjali. Er talan um avtalu um at keypa ella gera bygningar, sbrt. § 14, skal arbeiðstakarin, áðrenn iðranarfreistin byrjar, sbr. § 16, geva tí, sum hevur bílagt arbeiðið, upplýsingar um iðranarrættin sbrt. kapittul 3.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um skipan av og innihald í teimum í stk. 1 nevndu upplýsingum.

**§ 20.** Um ein keypari iðrar avtaluna eftir ásetingunum í kapitli 2, er seljari, í sambandi við møguligt viðurgjaldskrav frá einum professjonellum ráðgeva, settur sum um ognin ikki var seld.

## Kapittul 4
## Frávik lógarinnar o.a.

**§ 21.** Víkjast kann ikki frá ásetingunum í kapitli 1 til bága fyri keypara ella seljara uttan so, at viðkomandi hevur handlað sum liður í yrki sínum. Tó kann verða avtalað, at keypari, hóast ásetingina í § 2, stk. 5, 1. pkt., ikki skal kunna gera galdandi viðurskifti, sum eru íkomin eftir, at støðufrágreiðingin er gjørd ella endurnýggjað, sbr. § 4, stk. 1.
*Stk. 2.* Víkjast kann ikki við avtalu frá ásetingunum í kapitli 2 til bága fyri keypara.
*Stk. 3.* Víkjast kann ikki við avtalu frá ásetingunum í kapitli 3 til bága fyri tann, sum hevur bílagt arbeiðið.
*Stk. 4.* Víkjast kann ikki við avtalu frá ásetingini í § 20 til bága fyri seljara uttan so, at viðkomandi hevur handlað sum liður í starvi sínum.

**§ 22.** Í keypsavtalum, har ásetingarnar í kapitli 1 verða at nýta, sbr. § 1, kunnu ásetingar í avtaluni um, at keypari ikki kann gera galdandi fysisk ábrek við ognini, og onnur almenn fyrivarni, ikki gerast galdandi mótvegis keypara í tann mun, seljari sjálvur kundi havt fingið sama rættarvirknað við at fylgja teirri í § 2 nevndu mannagongd.

## Kapittul 5
## Revsiásetingar

**§ 23.** Er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóggávu, verður við bót revsaður tann, sum ikki letur upplýsingar sbrt. § 19, stk. 1. Landsstýrismaðurin kann í reglum, sum verða givnar við heimild í § 19, stk. 2, áseta, at brot á hesar reglur verða revsað við bót.

*Stk. 2.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

## Kapittul 6
## Gildiskoma

**§ 24.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012 og hevur virknað fyri avtalur, sum verða gjørdar eftir gildiskomuna.

Tórshavn, 6. oktober 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 12/2011

Nr. 138 6. oktober 2011

**Løgtingslóg**
**um**
**lutaíbúðafeløg**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## Kapittul 1
## Nýtsluøki lógarinnar o.a.

*Virkisøki o.a.*

**§ 1.** Eitt lutaíbúðafelag eftir hesi lóg er eitt felag, sum hevur sum endamál at útvega, byggja, eiga og reka eigindóm í lutafelag soleiðis, at felagsins limir sum luthavarar hava lut í ognum felagsins, og hin einstaki luthavarin í tí sambandinum hevur brúksrætt til eina íbúð í eigindóminum.

**§ 2.** Í lutaíbúðafelag hefta luthavararnir ikki persónliga fyri skyldum felagsins, men hefta bert við innskotinum.
*Stk. 2.* Í viðtøkum felagsins kann hóast stk. 1 verða ásett, at fyri láni, sum verður tikið í sambandi við stovnanina ella eftir stovnanina sbrt. lógliga samtykt á aðalfundi, og sum er tryggjað við veðbrævi ella handveð í eigaraveðbrævi, hefta limirnir persónliga og pro rata eftir teirra luti í ognunum, um lánveitari hevur tikið fyrivarni um hetta.
*Stk. 3.* Persónliga heftingin kann einans gerast galdandi av lutaíbúðafelagnum, umframt í tí førinum at felagið verður avtikið av búnum.

**§ 3.** Lógin verður nýtt fyri lutaíbúðir til bústaðarendamál.
*Stk. 2.* Lutaíbúðir kunnu bert verða gjørdar í eigindómum við í minsta lagi 3 bústaðaríbúðum.

**§ 4.** Tað kunnu ikki verða stovnað partafeløg ella smápartafeløg, har tað til ognarlutin í felagnum er atknýttur ein brúksrættur í eini íbúð í eigindómi, sum felagið eigur.

## Kapittul 2
## Stovnan

*Stovnarar*

**§ 5.** Eitt lutaíbúðafelag kann verða stovnað av einum ella fleiri stovnarum.
*Stk. 2.* Fráboðan um gjaldsteðg má ikki vera latin inn ímóti einum stovnara, og ein stovnari má ikki vera undir trotabúarviðgerð.
*Stk. 3.* Um stovnarin er ein fysiskur persónur, skal persónurin vera myndugur og má ikki vera undir verjumáli eftir § 5 í verjumálslógini ella undir samverjumáli eftir § 7 í verjumálslógini.
*Stk. 4.* Um stovnarin er ein løgfrøðiligur persónur, skal hesin vera heimilaður at fáa rættindi, átaka sær skyldur og at vera partur í rættarmálum.

*Viðtøkur*

**§ 6.** Lutaíbúðafelagið setur sjálvt í viðtøkum fyri felagið nærri reglur um skyldur og rættindi hjá luthavarunum, um leiðslu felagsins, roknskaparførslu, grannskoðan o.a.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ger standardviðtøkur, sum feløgini kunnu brúka.

*Skráseting*

**§ 7.** Lutaíbúðafeløg kunnu verða skrásett eftir reglunum í kongligari fyriskipan nr. 1111 frá 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um skrásetingina, herundir reglur um gjald fyri skráseting.
*Stk. 3.* Velur lutaíbúðafelagið at verða skrásett, skulu, umframt viðtøkurnar fyri felagið, við fráboðanini fylgja tær upplýsingar, sum nevndar eru í § 11 í kongligari fyriskipan frá 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder,

## Kapittul 3
## Limaskapviðurskifti o.a

*Lutur*

**§ 8.** Luthavararnir í lutaíbúðafelagnum hava lut í ognum felagsins soleiðis, sum hetta er ásett í viðtøkum felagsins.

*Íbúðaavgjald*

**§ 9.** Til rindan av felagsútreiðslum, heruppi í rindan av veðskuld, viðlíkahaldi og umsiting, rinda luthavararnir í lútaíbúðafelagnum eitt íbúðaavgjald. Aðalfundurin ásetur støddina á íbúðaavgjaldinum bindandi fyri allar limirnar.
*Stk. 2.* Innanhýsis lutfallið millum støddina á íbúðaavgjaldinum fyri einstøku íbúðirnar verður ásett í sama lutfalli, sum luthavararnir hava lut í ognunum hjá lutaíbúðafelagnum.

*Eigaraskrá*

**§ 10.** Lutaíbúðafelagið skal føra eina eigaraskrá yvir luthavararnar, sum greitt skal tilskila, hvørja íbúð í nummarraðfylgju hvør luthavari hevur brúksrætt til. Í eigaraskránna verða eisini førdar fráboðanir eftir § 13.

*Uppsøgn av limaskapinum*

**§ 11.** Luthavari í lutaíbúðafelagi kann ikki siga limaskapin upp, og hevur bert rætt at fáa innskotið aftur, um felagið verður tikið av eftir § 19.

*Avhendan, veðseting og úttøka*

**§ 12.** Luturin kann avhendast, heruppi í veðsetast, og tað kann verða framd úttøka í lutinum. Í viðtøkunum kunnu verða gjørdar avmarkingar viðvíkjandi prísinum í sambandi við sølu av lutinum.

*Fráboðanir um avhendan til ognar ella veð*

**§ 13.** Avhendar luthavari sín lut til ognar ella veð, hevur avhendanin ikki gildi mótvegis kreditorunum hjá luthavaranum uttan so, at felagið frá luthavaranum ella frá tí, sum luturin er avhendaður til, hevur fingið fráboðan um avhendanina.
*Stk. 2.* Hevur luthavari avhendað sama lut til fleiri, gongur ein seinni keypari ella veðhavari framum, um felagið fyrst fær fráboðan um avhendanina til hendan, og seinni keyparin ella veðhavarin var í góðari trúgv, tá fráboðanin kom fram til felagið.

*Lutaprógv*

**§ 14.** Fyri lutin verður útgivið lutaprógv. Verður lutaprógvið burtur, kann nevndin geva út nýtt, sum skal tilskila, at tað kemur í staðin fyri tað, sum er burturblivið.

*Avmarmarkingar viðvíkjandi eigaraskapi*

**§ 15.** Einans fysiskir persónar kunnu eiga ein lut í vanligum lutaíbúðafeløgum.
*Stk. 2.* Eingin kann eiga meira enn ein lut í einum lutaíbúðafelag.
*Stk. 3.* Luthavari hevur bústaðarskyldu í íbúðini, ið hoyrir til lutin.
*Stk. 4.* Eru serligar grundir, hevur luthavari rætt at framleiga íbúðina í avmarkað tíðarskeið.
*Stk. 5.* Fleiri persónar kunnu eiga ein lut í samogn.
*Stk. 6.* Bert ein íbúð kann vera atknýtt hvørjum luti.
*Stk. 7.* Stk. 1-4 eru ikki galdandi fyri seljara av lutaíbúðum til lutaíbúðafelag undir stovnan, tá seljari ikki fær selt allar íbúðirnar í eigindóminum.
*Stk. 8.* Hóast stk. 1- 4 kann kravánari, sum yvirtekur lut ella lutir á tvingsilssølu, eiga lut ella lutir í íbúðafelagnum í upp til 2 ár.

## Kapittul 4
## Aðalfundur

*Aðalfundur*

**§ 16.** Rættur luthavaranna at taka avgerðir í lutaíbúðafelagnum verður útintur á aðalfundinum.
*Stk. 2.* Hvør lutur hevur eina atkvøðu á aðalfundinum.
*Stk. 3.* Avgerðir á aðalfundinum verða tiknar við einføldum meiriluta, sbr. tó stk. 4 og 5.
*Stk. 4.* Avgerð um viðtøkubroyting er bert galdandi, um í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðunum og av tí partinum av luthavarunum, sum er umboðaður á aðalfundinum, hava tikið undir við henni.
*Stk. 5.* Avgerð um viðtøkubroyting, sum hevur við sær, at skyldur luthavaranna mótvegis lutaíbúðafelagnum økjast, er bert galdandi, um allir luthavararnir, hvørs skyldur økjast, eru samdir um tað.

*Ógildugar aðalfundaravgerðir*

**§ 17.** Á aðalfundinum má ikki takast avgerð, sum eyðsýnt kann geva ávísum luthavarum ella øðrum óhóskandi fyrimun, sum aðrir luthavarar ella lutafelagið svíða fyri.

## Kapittul 5
## Avtøka

**§ 18.** Aðalfundurin velur ein ella fleiri avtøkustjórar at avtaka lutaíbúðafelagið.
*Stk. 2.* Eftir at aktiv felagsins eru realiserað, og skuldin rindað, verður ognin, sum er eftir, býtt millum luthavararnar í mun til støddina á teirra luti.

## Kapittul 6
## Upplýsingarskylda o. a.

**§ 19.** Í sambandi við sølu av luti í lutaíbúðafelagi undir stovnan skal seljari ella umboðsmaður hansara lata keypara fullfíggjaðar upplýsingar um fíggjarviðurskifti, heftilsisviðurskifti og annars um øll týðandi viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri keyparans avgerð um at keypa ein lut í viðkomandi lutaíbúðafelagi undir stovnan. Seljari ella umboðsmaður hansara hevur harumframt skyldu til í neyðugan mun at innheinta og eftirkanna upplýsingar eftir pkt. 1. Upplýsingarnar skulu vera latnar, áðrenn keypari letur bindandi boð.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um upplýsingar og kanningarskylduna eftir stk. 1.

*Iðranarrættur*

**§ 20.** Keypari hevur rætt til innan fyri eina freist upp á 6 yrkadagar, sum verður roknað frá tí løtu, bindandi keypsboð er givið, at siga seg leysan av eini avtalu ella bindandi boði um keyp av luti í lutaíbúðafelag undir stovnan (iðranarrættur).
*Stk. 2.* Iðranarrætturin er treytaður av,
1) at keypari hevur latið seljara ella umboðsmanni hansara skrivliga fráboðan um, at keypari ynskir at nýta iðranarrættin, og
2) at fráboðanin er komin fram, áðrenn iðranarfreistin er farin.

*Stk. 3.* Keyparin skal í serligum skjali hava upplýsingar um iðranarrættin og um nær, iðranarfreistin byrjar og endar. Keypari skal harumframt hava upplýsing um, hvørja adressu fráboðan um iðran skal sendast. Upplýsingarnar skulu latast í seinasta lagi samstundis, sum hinar upplýsingarnar eftir stk. 1.

## Kapittul 7
## Revsing o. a.

*Revsing*

**§ 21.** Tann, sum vinnuliga selur lutir í lutaíbúðafeløgum undir stovnan og ikki letur upplýsingar um iðranarrætt, verður revsaður við bót.
*Stk. 2.* Tað kann verða álagt løgfrøðiligum persónum revsiábyrgd eftir revsilógarinnar kapittli 5.

*Stk. 3.* Í fyriskipanum frá landsstýrismanninum eftir § 5, stk. 2 kann verða ásett, at brot á ásetingarnar í fyriskipanunum verður revsað við bót.

*Ígildiskoma*

**§ 22.** Hendan løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngørd.

Tórshavn, 6. oktober 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 78/2011

Nr. 139 6. oktober 2011

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1

Í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 111 frá 9. desember 2010, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3 verður orðað soleiðis:
„**§ 3.** Pensjónsupphæddirnar, upphæddirnar fyri vanligt og serligt barnagjald, umframt frádráttarupphæddirnar o.a. í teimum í § 2 nevndu lógum eru:

1) Løgtingslóg um almannapensjónir o.a.:

| | Byrjunarár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Grundupphædd til fólkapensjón – støk | 2012 | 50.028,00 |
| Grundupphædd til fólkapensjón – gift hvør | 2012 | 39.756,00 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 71.256,00 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – gift hvør | 2012 | 56.628,00 |
| Viðbót til fólkapensjón – støk | 2012 | 38.652,00 |
| Viðbót til fólkapensjón – gift hvør | 2012 | 29.916,00 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 70.824,00 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón - gift hvør | 2012 | 63.948,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 22.992,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – gift hvør | 2012 | 19.968,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 21.708,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – gift hvør | 2012 | 17.424,00 |
| Eyka viðbót til lægstu fyritíðarpensjónistar | 2012 | 33.564,00 |
| Hjálparviðbót | 2012 | 35.544,00 |
| Røktarviðbót | 2012 | 70.956,00 |
| Avlamisviðbót/avlamisveiting | 2012 | 33.240,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd fyri fólkapensjónistar | 2012 | 61.000,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd fyri fyritíðarpensjónistar | 2012 | 91.500,00 |

2) Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.:

| | Byrjunarár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Upphædd | 2012 | 7.488,00 |

3) Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.:

| | Byrjunarár | Kr. |
|---|---|---|
| Barnagjald sbrt. § 5 | 2012 | 12.804,00 (árliga) |
| Gjald í sambandi við føðing eftir § 6, stk. 1 | 2012 | 739,45 (eingangsupphædd) |
| Gjald til uppihald tveir mánaðir áðrenn og ein mánaða aftaná føðing eftir § 6, stk. 1 | 2012 | 1.265,29 (mánaðarliga) |
| Barnagjald sbrt. § 15, stk. 1 og 2 | 2012 | 12.804,00 (árliga) |
| Økt barnagjald sbrt. § 15, stk. 3 | 2012 | 25.608,00 (árliga) |
| Barnaískoyti sbrt. § 19a | 2012 | 1.620,00 (um ársfj.)“ |

2) Aftaná § 3 verður sett:

„**§ 4.** Giftur pensjónistur, sum fær varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón samsvarandi við stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at hann er fluttur inn.

*Stk.* 2. Pensjónistur, hvørs hjúnafelagi fær varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón samsvarandi við stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at hjúnafelagin er fluttur inn.

*Stk. 3.* Giftur pensjónistur, sum hóast liðugt viðgjørdur, framhaldandi er innskrivaður á sálarsjúkrahúsi og er á visiteraðum bíðilista til varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón samsvarandi við stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at pensjónisturin verður mettur at vera liðugt viðgjørdur.

*Stk. 4.* Pensjónistur, hvørs hjúnafelagi er innskrivaður á sálarsjúkrahúsi hóast liðugt viðgjørdur og er á visiteraðum bíðilista til varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón samsvarandi við stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at hjúnafelagin verður mettur at vera liðugt viðgjørdur.“

3) § 6 verður orðað soleiðis:

„**§ 6.** Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð í seinasta lagi 1. desember á hvørjum ári javnaðu almannaveitingarnar fyri komandi ár.“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

Tórshavn, 6. oktober 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 7/2011

Nr. 140 6. oktober 2011

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:
„**§ 1.** Húsalánsgrunnurin hevur til endamáls:
   1) at virka fyri at øll í Føroyum skulu hava møguleika fyri at útvega sær ein bústað
   2) at tryggja fjølbroytni á bústaðamarknaðinum, og
   3) at stuðla upp undir Veðurlagspolitikk Føroya at minka orkunýtsluna hjá føroyska býlishópinum.“

2) Í § 5, stk. 2 verður „80%“ broytt til: „90%“.

3) Aftaná § 5 verður sett sum nýggj § 5 a, § 5 b og § 5 c:
„**§ 5 a.** Húsalánsgrunnurin kann veita veðskuldarlán til íbúðafeløg og íbúðastovnar, sum eru skipað sum sjálvsognarstovnar ella lutafeløg.
*Stk. 2.* Lán eftir stk. 1 skulu veðsetast innan fyri 80% av metingarvirðinum við tinglýstum veðbrævi, ognarbrævi, skaðaloysisbrævi o.l. í somu fastogn ella við aðrari samsvarandi trygd.
*Stk. 3.* Áðrenn lán verða veitt eftir stk. 1, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð reglur og treytir um lánsveiting.

**§ 5 b.** Húsalánsgrunnurin kann einsamallur ella saman við kommunum, feløgum og stovnum útvega, reka og leiga út íbúðir, íbúðahús og lestrarbýlir.
*Stk. 2.* Áðrenn Húsalánsgrunnurin útvegar bústaðir eftir stk. 1, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð reglur og treytir fyri hesum virksemi grunsins.

**§ 5 c.** Húsalánsgrunnurin kann veita realkredittlán at fíggja føroyskar bústaðir.
*Stk. 2.* Áðrenn Húsalánsgrunnurin fer í holt við at veita realkredittfígging eftir stk. 1, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð reglur og treytir fyri hesum virksemi grunsins.“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

Tórshavn, 6. oktober 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 77/2011

Nr. 141 11. oktober 2011

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið verður gjørd henda broyting:

Í § 5 verður sum stk. 6 sett:
„*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um gjald fyri uppihald á Psykiatriska depli fyri persónar, ið eru liðugt viðgjørdir og fáa pensjón. Gjaldið kann tó í mesta lagi verða tað, sum búfólk á sambýlum, góðkend sambært § 32, stk. 2 í forsorgarlógini, rinda.“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

Tórshavn, 11. oktober 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 4/2011

Nr. 142 6. oktober 2011

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.**
(mótrokning millum hjún)

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 26. mai 2010, verður gjørd henda broyting:

§19, stk 1 verður orðað soleiðis:
„**§ 19.** Viðbótin til fólkapensjón verður lækkað við 60% av inntøkugrundarlagnum sambært § 20.“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

Tórshavn, 6. oktober 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 75/2011

Nr. 143 6. oktober 2011

**Løgtingslóg**
**um**
**at seta úr gildi løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

Løgtingslóg nr. 108 frá 22. desember 1999 um uppihald á stovni o.l., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 22. desember 2009, fer úr gildi 1. januar 2012.

Tórshavn, 6. oktober 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 5/2011

Nr. 144 7. oktober 2011

**Kunngerð**
**um**
**flokkar og bókstavmerking til løgtingsvalið 29. oktober 2011**

Við heimild í § 16, stk. 2 í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið, sum seinast broytt við kunngerð nr. 114 frá 5. september 2011, verður við hesum gjørt kunnugt, at fylgjandi flokkar kunnu luttaka í løgtingsvalinum 29. oktober 2011:

| | |
|---|---|
| Hin Føroyski Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) | Listi A |
| Sambandsflokkurin | Listi B |
| Javnaðarflokkurin | Listi C |
| Sjálvstýrisflokkurin | Listi D |
| Tjóðveldi | Listi E |
| Framsókn | Listi F |
| Miðflokkurin | Listi H |

Valevnislistar, sum siga seg taka undir við hesum flokkum til valið, skulu vera merktir við bókstavinum, sum stendur út fyri flokkinum.

Løgmansskrivstovan, 7. oktober 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705